# Veðrið



**Fimm-daga-for-søgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Hvassur vindur av útsynningi og ælingur, seinnapartin lækkar hann niður í sunnan og veksur vindin til skrið og regn. Um kvøldið hækkar hann aftur upp í vestan og ælingur, partvís vátaslettingur ella kavi. Hitin um dagin um 5 stig, um náttina um frostmarkið.




**Veðrið leygardagin:**
Hvassur vindur av útsynningi, men hann minkar vindin út á dagin. Sólglottar, men framvegis vátasletings- ella kavaæl. Hitin millum frostmarkið og 3 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av vestri og útnyrðingi og sólglottar, men eisini kavaælingur. Hitalagið um frostmarkið.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Hann veksur vindin upp í skrið av suðri og landsynningi og regn. Hitin um 5 stig. Seinni snarar hann í útsynning og vestan – framvegis hvassur vindur. Ælingur, partvís vátaslettingur ella heglingur, men eisini onkur sólglotti. Hitin fellur niður móti frostmarkinum.

# Í slóðum beatlanna

*Um eina viku fer Útvarp Føroya undir at senda dokumentarsending um teir fýra, George Harrison, Ringo Starr, Paul McCartney og John Lennon, tilsamans kendir sum The Beatles*

Fyrsti partur í nýggjari dokumentarsendirøð um víðgitna tónleikabólkin, The Beatles, fer av barkastokki í Útvarpi Føroya fríggjakvøldið 18. Februar klokkan 19.00. Sendingarnar, sum ætlandi verða einar fimm í tali, eru hvør ein tíma til longdar.

Nú í vár eru tredivu ár liðin í síðani The Beatles gavst at spæla. Samstundis varð punktum sett fyri eini tí mest glæsiligu virkisleið í tónleiki yvirhøvur. The Beatles breyt upp úr nýggjum og setta nýggja kós. Fáur einstaklingur ella bólkur hevur sum teir ávirkað og litað tónleikin, sum komin er hesi seinastu tríati árini.

**Stóra ávirkan**
The Beatles fekk eisini ovurstóra ávirkan á mentunarligu gongdina. Ungdómsbyltingarnar í sekstiárunum tóku seg ikki minst upp í kjalarvørri beatlanna. Teir ávirkaðu og førkaðu mótan, rúsevnisvanar, friðarhugsjónina, uppfatanina av eysturlendskari siðalæru og – fremst av øllum – tónleiki!

Útvarpsmaðurin, Suni Merkistein, og tøkningurin, Pauli Magnussen, gingu í fjørð heyst í slóðum beatlanna í heimbýnum, Liverpool, og við sær heim aftur høvdu teir upptøkur, sum fara at seta sín dám á sendingarnar. Greitt verður frá søguni um The Beatles frá fyrstu árunum í uppvøkstrinum og fram til slitið í 1970. Fleiri kut úr samrøðum við limirnar í The Beatles verða at hoyra í sendingunum.

**Siga sína hugsan**
Tónleikurin fær, sum vera man, drúgva umrøðu. Sum ein reyður tráður í sendingunum gongur tann røðin av føroyskum tónleikarum og yrkjarum, sum fara at siga sína hugsan um bólkin. Ikki færri enn átjan eru teir í tali; Niclas Johannesen, Eyðun Nolsøe, Sunleif Rasmussen, Jóhannus á Rógvi Joensen, Bjarni Restorff, Óli Poulsen, Edvard Nyholm Debes, Martin Joensen, Zacharias Sørensen, Stanley Samuelsen, Martin Mouritsen, Jørgin Dahl, Kaj Johannessen, Jónleif Jensen, Djóni Andreasen, Rói Patursson, Hanus Andreasen og Heri Kragesteen.

Suni Merkistein leggur sendirøðina til rættis og Pauli Magnussen tekur sær av tøkniligu uppgávuni.



*The Beatles uttanfyri Buckingham Palace í 1965. Drotningin hevði júst handað teimum MBE-heiðursteknið*



*Barnaheim John Lennons var at kalla óbroytt, tá útvarpið vitjaði í Leverpool í fjør heyst. Umleið hálvthundrað ár eru millum myndatøkurnar*



*John Lennon sum smádrongur uttanfyri barnaheimið á Menlove Avenue í Liverpool*

**Í gjár**

Tíverri fingu vit ikki kortið í dag

**Í dag**

Tíverri fingu vit ikki kortið í dag




**Hitalagið mált frá 09./02. kl 06[00]–10./02. kl 06[00]. Hitin í gjár: 3,6°C**
Minsti hiti máldur í februar: **÷11,0°** Mesti hiti máldur í februar: **11,0°**




Avfallið: 7,0 mm – **mált frá 09./02. kl 6[00]–10./02. kl 06[00]**
Avfallið higartil í februar: 72,5 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷15 |
| Nuuk | ÷8 |
| Qaqortoq | ÷12 |
| Ammassalik | ÷1 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 1 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 9 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 3 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannahavn | 3 |
| Helsinki | ÷3 |
| Moskva | 2 |
| Berlin | 5 |
| Warzawa | 5 |
| Kiev | 2 |
| Bukarest | 4 |
| Paris | 9 |
| Madrid | 13 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 14 |
| Malta | 14 |
| Tunis | 18 |
| Beijing | 3 |
| New Dehli | 21 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | – |
| New York | 4 |
| Miami | 15 |
| Los Angeles | 14 |
| Meksikobýur | 14 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 8 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 29 |


www.sosialurin.fo

TURRIKLÆÐI, HÚGVUR, T-SHIRT, KEPPAR og FLØGG



12. MAÐUR
Tlf. 213212


## Vestfalskyrrindi

1. februar: Mánin longst frá jørðini
5. februar: Tendring
12. februar: Fyrra kvarter
17. februar: Mánin næstur jørðini

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmannasundi fp | sp | Mykinesfirði fp | sp | Nólsoyarfirði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvannasundi fp | sp | Fugloyarfirði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 11. feb. | 9:53 | 22:16 | 8:53 | 21:16 | 9:08 | 21:31 | 11:53 | — | 0:33 | 12:53 | 8:08 | 20:31 | 7:08 | 19:31 | 10:08 | 22:31 | 11:08 | 23:31 | 9:38 | 22:01 | 10:53 | 23:16 |
| 12. feb. | 10:39 | 23:09 | 9:39 | 22:09 | 9:54 | 22:24 | 0:16 | 12:39 | 1:16 | 13:39 | 8:54 | 21:24 | 7:54 | 20:24 | 10:54 | 23:24 | 11:54 | — | 10:24 | 22:54 | 11:39 | — |
| 13. feb. | 11:42 | — | 10:42 | 23:26 | 10:57 | 23:41 | 1:09 | 13:42 | 2:09 | 14:42 | 9:57 | 22:41 | 8:57 | 21:41 | 11:57 | — | 0:24 | 12:57 | 11:27 | — | 0:09 | 12:42 |
| 14. feb. | 0:26 | 13:13 | — | 12:13 | — | 12:28 | 2:26 | 15:13 | 3:26 | 16:13 | 11:28 | — | 10:28 | 23:17 | 0:41 | 13:28 | 1:41 | 14:28 | 0:11 | 12:58 | 1:26 | 14:13 |